gult10 cyan10 magenta10 svart10



# Fiskimaðurin má kenna etiska ábyrgd

*Jústinus Leivsson Eidesgaard*

-Tað hevur alstóran týdning at fáa vinnuna at skilja, at fiskiskapur snýr seg ikki bara um búskap. Fiskiskapur er eisini at fara væl um fiskin, sum ein felags arv, ið skal latast víðari til okkara eftirkomrar, sigur Otto Gregusen.



*Otto Gregussen, norski fiskimálaráðharrin.*

*Edvard Joensen*

Norski fiskimálaráðharrin Otto Gregussen er á vitjan í Føroyum í samband við ráðstevnuna um náttúruvernd og burðardygga veiðu í Norðuratlantshavi.

-Vit høvdu ein fund herfyri í Lofoten, har føroyski fiskimálaráðharrin eisini luttók. Á hesum fundinum kom fram, at vit hava felags ábyrgd fyri at fiskastovnarnir verða umsitnir so væl sum møguligt. Talan er um ein heimsarv, sum ikki má ganga til grundar. sigur hann.

-Vit tosa í dag um etiska ábyrgd. Tað hevur alstjóran týdning at hugburðurin, at tað er etiskt skeivt ikki at halda reglarnar sum eru ásettir fyri burðardyggari veiðu. Tað er týdningarmikið, at hetta nær út til tann einstaka fiskimannin, at hann veruliga skal kenna við sær sjálvum, at tá hann ikki heldur ásetingarnar, so ger hann nakað skeivt, eins og við øðrum lutum í lívinum, sigur Otto Gregussen.

-Eg haldi, at hendan ráðstevnan hevur eitt sera áhugavert tema Júst tað, at vit eiga eitt felags hav og vit skulu duga at fara um tað soleiðis, at okkara eftirkomarar kunnu fáa eins stóra gleði og vinning av tí, sum vit sjálvi. Tað er okkara ábyrgd og eg rokni við at ráðstevnan her fer at knýta okkum tættari saman, sigur Otto Gregussen.

# Trolið er størsta hóttanin móti toskinum

*Jústinus Leivsson Eidesgaard*

Høvundurin av bókini »Toskurin, fiskurin íð broytti heimin«, stóð á røðarapallinum í Norðurlandahúsinum hósmorgunin. Hann er ikki vísundamaður, men ein professionellur rithøvundur, sum skrivar fyri pening og sum hevur stóran áhuga fyri toski. Men um hann ikki er vísundamaður, so kunnu vit lurta eftir honum allíkavæl, tí sum hann sigur, veruleikin er, at vit vita als ikki alt um hvat svimur í havinu,.

-Eg helt ein fyrilestur á lærda háskúlanum í Reykjavík fyri nøkrum árum síðan og har segði eg millum annað, at fiskifrøðingar hava ikki nóg neyvar arbeiðsháttir at meta um stovnar. Fiskifrøðingarnir, sum vóru hjástaddir, dámdu hetta einki serligt og høvdu hug at fýlast at, men eg rokni við, at vit eru samdir í dag. Støðan er ikki ov góð við íslendska toskastovninum. Eg haldi, at er eitt faktum, at vit vita ikki alt um fiskin, sum svimir í havinum, og tí skulu vit ansa eftir, sigur Mark Kurlansky.

-Í 19 øld fóru franskmenn veruliga undir fiskivinnu, og staturin stuðlaði við peningi, soleiðis at fransar kundu royna á fjarleiðum. Ein baktanki við nýggju fiskivinnunu, um hetta mundi, var kanska, at samstundis sum menn fiskaðu, so var hetta góð sjóvenjing, sum aftur kundi nýtast í flotanum, skuldi kríggj brostið á, segði Mark Kuransky.

Fransar royndi seg við línu og kring í Norðuratlantshavi, har fransar royndu, hildu fólkini, at línan var av tí illa og oyddi fiskin. Tá var mest vanligt at fiska við snøri. Í dag er trolið nokk størsta hóttanin móti toski, segði Mark Kurlansky.



*Mark Kurlansky í Norðurlandahúsinum.*

*Mynd Jústinus Leivsson Eidesgaard*

### Verri seinnu tíðina

Toskur hevur elvt til kríggj og seinastu 30 árini eru nógvar broytingar hendar innan fiskivinnu.

-Tað var ikki bara gott,at íslendingar sum teir fyrstu fluttu fiskimarkið út. Hetta fekk stórar avleiðingar fyri aðrar fiskitjóðir. Roknað var við, at tá londini fluttu markið út, so kundu tey fiska sum tey vildi innan hetta mark, og at tey tá sjálvi kundu umsita stovnarnar. Men hetta hevur ikki eydnast serliga væl, hyggja vit eftir hvussu toskurin hevur tað. Tá kanadamenn fluttu fiskimarkið út, so stuðlaðu myndugleikarnir eisini at gera eina risaflota, sum kundi fiska innanfyri fiskimarkið. Hyggið eftir útlitinum í dag. Tað eru ikki bara útlendingar sum hava oytt toskastovnin í Newfoundlandi og við Labrador. Nýggju fiskimørkini góvu ikki av sær sjálvum góða stovnsrøkt, tí eiga vit øll ábyrgd fyri ovurveiðu, sigur Mark Kurlansky.

-Eg var fiskimaður sjálvur í sekstiárunum. Tá var eisini tosað um ovurveiðu, men ongantíð hjá okkum sjálvum. Tá vit tosaðu um ránsveiðu, so vóru tað altíð russar og japanesarar sum framdu hetta. Men vit mugu síggja í eyguni í dag, at vit sjálvi eisini eru við at troyta stovnarnar ov hart, sigur hann.

Mark Kurlansky varð spurdur hví toskastovnurin við Newfoundland veksir so seint.

-Eg veit tað ikki, tað er so nógv vit ikki vita í havinum. Men at kópur aleina skal halda stovninum niðri, tað trúgvi eg ikki. Eg trúgvi neyvan, at toskurin kom aftur í Newfoundlandi, um vit veiddu allan kópin. Tað hevur nakað við veðurlagsbroytingar og broytingar í náttúruni sum ger, at tá ein stovnur er lítil, so megnar hann ikki at fóta sær aftur, sigur Mark Kurlansky

-Alla staðni í Kanada sær tú kóp sum leika, við einum toski í munninum. Eg haldi, at toskurin er horvin úr munninum nú. Millum mannað hevur verið hildið at kópurin er tann fitti og toskurin tann býtti. Men nakra einfalda forkláring uppá hví toskurin ikki kemur aftur hava vit ikki, sigur Mark Kurlansky.

-Sjálvur eri er optimist. Eg haldi at avmarkingarnar í fiskivinnuni enn bara eru á byrjunnarstøði og at hesar fara at gerast betri og effektivari í framtíðini. Tað fer at bera til at gagnnýta toskin á burðardyggum støði. Spurningurin kann tó vera, um hesar avmarkingar eru komnar ovseint, sigur Kurlansky.

-Eg haldi, tað er deiligt at tosa við fólk, sum einki løgið halda vera í at ein setir seg niður og skrivar eina heila bótk um tosk, sigur Kurlansky

# Otto Gregussen heldur ES vera órímuligt

*Jústinus Leivsson Eidesgaard*

Norski fiskimálaráðharrim. Otto Gregussen, sum er í Føroyum í løtuni, við ikki siga um hann er bjartskygdur ella svartskygdur fyri útslitinum av svartkjaftafundinum, sum hevur hildin í Føroyum fyrst í juli.

-Tað einasta eg vil siga er, at eg haldi at uppskotið hjá ES til ein býtislykil, har Noreg bert fær 12 prosent av kvotuni er heilt órímiligur. Vit hava verið við til at fiska svartkjaftin frá byrjan og vit kunnu slett ikki góðtaka uppskotið frá ES, sigur Otto Gregussen.

-Eg skilji heldur ikki tilmælini frá ICES um svartkjaftastovnin sum eina null loysn. ICES sigur greitt at bann eigur at vera sett fyri allari svartkjafta veiðu til ein semja er fingin millum londini um býtislykilin, og tað merkir ikki tað sama sum at øll svartkjaftaveiða steðgar í komandi ári, sigur Otto Gregussen.

Fundurin um svartkjaftin verður í Føroyum 5. juli og tað er føroyski fiskimálaráðharrin Jørgen Niclasen, sum hevur tikið stig til fundin. Londini, sum veiða svartkjaft, tey eru Føroyar, Ísland, Grønland, Noreg, Russland og ES hava hildið fleiri fundir fyrr um at finna ein býtislykil til svartkjaftin, men uttan útslit.

Dapra tilmæli hjá ICES um bann fyri veiðu av svartkjafti í komandi ári, skundaði undir avgerðina hjá Jørgen Niclasen, fiskimálaráðharra um at fáa londini til fundarborðið.

Løgmaður:

# Havið skilir og knýtir saman

*Jústinus Leivsson Eidesgaard*

-Tað eru tvey høvuðseyðkenni við Norðuratlantshavinum. Tað skilir sundur og knýtir saman. Vit hava alla tíð verðir skild sundir av havinum, men tøknin og altjóðagerið seinastu árini hevur knýtt okkum saman. Havið er okkara felags eyðkenni og í felag mugu vit fara væl um, segði Anfinn Kallsberg, løgmaður, tá hann setti ráðstevnuna The North Atlantic í Norðurlandahúsinum hósmorgunin.

-Fara vit væl um, so tryggja vit okkum at vit fáa meira burtur úr havinum, segði hann.



*Anfinnur Kallsberg, løgmaður*

-Vit hava seinni árini sæð, at londini hvørju megið Atlantshavið hava tikið seg saman í felag. Vit hava ES øðrumegin og Norðuramerika hinumegin. Hetta kann vera gott, men er ikki samstarv yvirum Atlantshavið, so er vandi fyri at vit her mitt í Atlantshavi gerast eitt marknaðarland millum hesar heimspartar, segði Anfinn Kallsberg.

gult11 cyan11 magenta11 svart11

# hygg & hoyr



Frá fríggjadegi 22. juni til hósdagin 28. juni

## Jeg ved hvad du gjorde sidste sommer




## Strømer i børnehaveklassen




**Leygardagin kl. 17.00**

## Sjómansendingin Vitin

Katrin Dagbjartsdóttir Johansen, sum vann fyrsta føroyska gullmerkið í altjóða svimjikappingum, er gestur í útvarpsstovuni. Pápin var sjómaður øll barna- og ungdómsárini hjá Katrini, sum fer at siga okkum frá mongum ymiskum kendingum og hugsanum.

*M. C. Restorff skipar fyri.*

*(Var sent fyrstu ferð hin 24. juni síðsta ár)*

**ÚF Leygarkvøldið kl. 19.05**

## Blái akurin

Útnorðurráðið hevur lýst árið í ár at vera »veiðuár« burturav. Tann serstaka mentanin, sum í útnorði er knýtt at veiðu, verður viðgjørd á stevnum og fundum, sum Útnorðurráðið og onnur skipa fyri.

Í útvarpssendingum í summar, fimm leygarkvøld á rað, verður nortið við hesa mentan, sum í øldir hevur verið ein lívstreyt í teimum trimum útnorðurlondunum Grønlandi, íslandi og Føroyum.

Í sendingunum, sum kallast »Blái akurin« verður prátað við fólk um hav, veiðu og mentan í Útnorðuri. Umframt tónleik um havið fara vit at hoyra yrkingar eftir Chr. Matras, Janus Djurhuus, Heðin Klein, Róa Patursson, Jóanes Nielsen og Alexandur Kristiansen, sum knýta seg afturat havinum kring okkum.

Tað er Birgir Kruse, ið leggur til rættis og fyrsta sendingin verður send í Útvarpinum leygarkvøldið 23. juni.

## Fríggjadagur 22. juni

### SVF

- 18.30 Likkulikkuleia 4
- 19.00 Trý á ferð 2:13
- 19.30 Í sanglæru 5:5 – um sangteknikk
- 20.00 Dagur Vika
- 20.20 Sjónvarpið hjá Finn – danskt undirhald
- 20.45 Gekkur
- 21.25 Sølumaður til sølu – am. drama
- 11.05 Switchback – amerikanskur spenningsfilmur Óhóskandi fyri børn
- 00.55 Liðugt

### Eurosport.com

- 07.30 Tennis
- 08.30 Football
- 09.30 Truck Sports
- 10.00 Car Racing
- 10.30 Mountain Bike
- 11.00 Olympic Games
- 11.30 Cycling
- 12.15 Tennis - Live
- 14.00 Tennis - Live
- 15.30 Formula 3000 - Live
- 16.00 Cycling - Live
- 17.00 Formula 3000
- 18.00 News
- 18.15 Football
- 19.15 Water Polo - Live
- 20.15 Sumo
- 22.00 News
- 22.15 Xtreme Sports
- 22.45 Xtreme Sports
- 23.15 Cycling
- 00.15 News
- 00.30 Close

### BBC Prime

- 00.00 TLZ: »Stevenson's Travels
- 01.00 TLZ: »The Mind Traveller – The Ragin' Cajun«
- 02.00 TLZ: »Background Brief - Consciousness«
- 02.15 TLZ: »What have the 60's ever done for us?«
- 02.30 TLZ: »The Cretaceous Greenhouse«
- 03.30 TLZ: »Fighting Rust in Your Car«
- 04.00 TLZ: »Blood on the Carpet – The Woodstock Story«
- 04.40 TLZ: »Megamaths – Measure - the King's New Clothes«
- 05.00 TLZ: »Suenos World Spanish«
- 05.15 TLZ: »Suenos World Spanish«
- 05.30 TLZ: »English Zone«
- 06.00 Noddy: »Noddy Has An Afternoon Off«
- 06.10 Angelmouse
- 06.15 Playdays
- 06.35 Blue Peter
- 07.00 Hero to Zero
- 07.30 Celebrity Ready, Steady, Cook
- 08.15 Style Challenge: »Retired Teacher«
- 08.40 Real Rooms
- 09.05 Bargain Hunt
- 09.30 Antiques Roadshow: »Knebworth House«
- 10.00 Molly's Zoo
- 10.30 TLZ: »Horizon – Masters of the Ionosphere«
- 11.15 Changing Rooms: »Maidenhead«
- 11.50 Celebrity Ready, Steady, Cook
- 12.30 Style Challenge: »Questions and Answers«
- 13.00 Doctors
- 13.30 EastEnders
- 14.00 Real Rooms in need of a revamp.
- 14.30 Bargain Hunt
- 15.00 Noddy: »Noddy Has An Afternoon Off«
- 15.10 Angelmouse
- 15.15 Playdays
- 15.35 Blue Peter
- 16.00 Hero to Zero
- 16.30 Top of the Pops 2
- 17.00 Gardeners' World
- 17.30 Doctors
- 18.00 EastEnders
- 18.30 Passport to the Sun
- 19.00 Hi-De-Hi
- 19.30 Next of Kin: »The Embarrassment Factor«
- 20.00 The Ice House
- 21.00 Harry Enfield and Chums
- 21.30 Later with Jools Holland
- 22.30 The Stand-Up Show
- 23.00 The Royle Family
- 23.30 Game On

### BBC World

- 00.00 BBC News
- 00.30 HARDtalk (r)
- 01.00 BBC News
- 01.30 Talking Movies (r)
- 02.00 BBC News
- 02.30 The Money Programme (r)
- 03.00 BBC News
- 03.30 Asia Today (r)
- 03.45 World Business Report (r)
- 04.00 BBC News
- 04.30 HARDtalk (r)
- 05.00 BBC News
- 05.30 Click Online (r)
- 06.00 BBC News
- 06.30 The Money Programme (r)
- 07.00 BBC News
- 07.30 HARDtalk
- 08.00 BBC News
- 08.30 Jeremy Clarkson's Extreme Machines (r)
- 09.00 BBC News
- 09.30 Life (r)
- 10.00 BBC News
- 10.30 HARDtalk (r)
- 11.00 BBC News
- 11.30 Talking Movies (r)
- 12.00 BBC News
- 12.30 Life (r)
- 13.00 BBC News
- 13.30 HARDtalk (r)
- 14.00 BBC News
- 14.15 World Business Report
- 14.30 Talking Movies (r)
- 15.00 BBC News
- 15.30 Life (r)
- 16.00 BBC News
- 16.30 Asia Today
- 17.00 BBC News
- 17.15 World Business Report
- 17.30 Jeremy Clarkson's Extreme Machines (r)
- 18.00 BBC News
- 18.30 World Business Report
- 18.45 Sport Today
- 19.00 BBC News
- 19.30 HARDtalk (r)
- 20.00 BBC News
- 20.30 Future Fantastic
- 21.00 BBC News
- 21.30 World Business Report
- 22.00 BBC News
- 22.30 Correspondent
- 23.00 BBC News
- 23.30 World Business Report (r)
- 23.45 Asia Today

### 3

- 05:00 Børne-hjørnet med Disney
- 07:05 TV-shop
- 08:00 Hvide Løgne(G)
- 08:25 Ricki Lake (G)
- 09:15 Ricki Lake
- 10:10 Horton-sagaen(G)
- 11:00 Horton-sagaen
- 11:50 Panter-tanter
- 12:20 Vild med dig
- 12:50 Melrose Place - classic
- 13:45 Interne Affærer
- 14:45 Pæn pige - sej sild
- 15:10 Min kære familie
- 15:40 Baywatch
- 16:35 Ricki Lake
- 17:30 Sabrina - skolens heks
- 18:00 Susan - sød og single
- 18:30 Dummere end politiet tillader
- 19:00 Sjov og Spas
- 19:30 Sjov og Spas
- 20:00 Faktor 21 Film: Blodpenge
- 21:45 Sex & the City
- 22:15 Frygtens sommer
- 23:55 Lægerne
- 00:55 Sunset Beach
- 01:45 Sunset Beach (G)
- 02:35 Godnat

### ÚF

- 07.00 Tíðindi
- 07.05 Morgunlestur Kirsten Ellendersen í Fámjin lesur.
- 07.15 Barnaløtan Jonna Olsen og Kári Sólstein stíla fyri
- 07.15 Morguntónleikur
- 07.30 Tíðindi
- 07.35 Góðan morgun Føroyar Dia Midfjord og Jákup Magnussen skipa fyri.
- 08.00 Tíðindi
- 08.03 Góðan morgun Føroyar
- 09.00 Tíðindi
- 09.03 Koparskrínið (e) Dánjal Joensen lesur 7. part av framhaldssøgu eftir Jens Paula Heinesen.
- 09.33 Dagsins tónar
- 09.50 Morgunlestur (e) Kirsten Ellendersen í Fámjin lesur.
- 10.00 Tíðindi
- 10.03 Fimleikaløtan Beinta Danielsen og Elsa Maria Bærentsen skipa fyri.
- 10.08 Máltráðurin Elis Poulsen er vertur.
- 11.00 Tíðindi
- 11.03 Á sanganna veingjum (e) Gunnvør Poulsen leggur til rættis..
- 11.33 Undir døgurða
- 12.00 Veðurtíðindi
- 12.02 Middagstónleikur
- 12.15 Skráin og lýsingar
- 12.20 Tíðindini
- 12.50 Døgurðatónar
- 13.00 Tónatímin
- 14.00 Í Víngarðinum (e) Alexander Samuelsen leggur til rættis.
- 15.00 Tíðindi
- 15.03 Rót og rútma (e) Petur Rouch velur country tónleik
- 16.00 Tíðindi
- 16.03 Summar 2001 Helena Debes Højgaard, Beinta Løwe Jacobsen og Høgni í Jákupsstovu skipa fyri.
- 17.00 Tíðindini
- 17.05 Vikuskiftið
- 18.00 Fríggjakvøldstónar Øssur Egholm velur løgini.
- 18.25 Skráin og lýsingar
- 18.30 Tíðindini
- 19.00 Studio Pegasus Kári Sólstein og Fróði Løkságarð leggja til rættis.
- 20.00 Estudio 2000 Kári Annand Berg skipar fyri.
- 21.00 Dagsetur Øssur Egholm leggur til rættis.
- 22.00 Tíðindi

### Rás 2

- 09:45 Orðið Bíbliulestur v/ Anju Hansen
- 10:00 Góðanmorgun-tónleikur
- 11:00 Gesturin (e) Vitjan á Rás 2
- 12:00 Tíðindi & lýsingar
- 12:15 Tónleikur
- 13:00 Leysaløtan Innsløg, prát og tónleikur
- 14:00 Ynskiløtan Heilsur frá lurtarunum
- 15:00 Tíðindi & lýsingar
- 15:15 Ynskiløtan (framhald)
- 16:00 Breytin Beinleiðis ferðslusending
- 17:00 Lættur tónleikur
- 18:00 Tíðindi & lýsingar
- 18:15 Lættur tónleikur
- 21:00 Tíðindi & lýsingar
- 21:15 Orðið (e) Bíbliulestur v/ Anju Hansen
- 21:30 Beatin v/ Eyðfinn Drewsen Tónleikasending fyri ung
- 22:30 Náttartónleikur

### Lindin

*Eingin skrá komin*